miðvikan
Nr. 99 • 27. mai 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Vanlukkan við Sally í 1937:**

# Skiparin á Tjaldrinum gongur burtur

Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**Tann 22. mai vóru 70 ár liðin, síðan danski sandbáturin Sally gekk burtur eystanfyri Sandoynna. Hetta gjørdist ein sera nógv umrødd vanlukka, eisini tí fyrrverandi skipari á Tjaldrinum druknaði**

At henda søgan kemur fram nú er tann bera tilvild. Seinasta heyst skrivaði ein dani, Kenneth Gaarslev, til Samvit um teir kundu útvega honum nakrar upplýsingar um hvørt pápi hansara, sum var við Sally, mundi vera jarðaður í Føroyum. Samvit beindi fyrispurningin til mín. Eg hevði so ikki hoyrt um hesa vanlukku og fór at kanna málið. Vit báðir Kenneth komu so í samband við hvønn annan, og úrslitið er henda frásøgnin um eina syrgiliga og meiningsleysa hending, sum kostaði fimm monnum lívið, millum hesar tann bert 15 ára gamli Carl Olsen úr Sørvági.

Frásøgnin er fyri tað mesta grundað á Føroya Social Demokrat, sum seinni gjørdist til Sosialin, og eisini donsk bløð og afturat upplýsingar frá Kenneth Gaarslev sjálvum, sum gjøgnum nógv ár hevur roynt at fáa greiðu á hesa hending.

Tað er sjáldan, at ein vanlukka á sjónum er lýst so væl sum henda. Tí skal henda grein vera til minnis um teir, sum hesa ferð ikki bóru boð í bý. Ikki minst er hetta galdandi fyri tann 15 ára gamla føroyska drongin, sum so meiningsleyst skuldi missa lívið.

## Vanlukkan

Mánadagin 22. mai kl. 10 í 1939 sakk danski sandsúgvarin Sally, ið flutti sand til tær havnir, sum tá vórðu bygdar í Føroyum.

Sally varð støðd í Kvørnini – ein strongur, ið gongur eystur úr Dalsfles við Dalsnýpu á Sandoy.

Sally hevði bunkrað kol í Havn og var síðan farin norður í Sundini eftir sandi. Haðani kom hann aftur á Havnina og tók ein stóran flaka uppá sleip. Henda flaka skuldu teir brúka við havnagerðina á Sandi.

Um 2-tíðina hendan morgunin fóru teir av Havnini. Veðrið var heilt gott.

## Missir flakan og koppar

Tá ið teir koma í Kvørnina við Dalsfles mistu teir flakan. Teir vendu aftur eftir honum og fingu fast í hann aftur. Men óslætt var, og skjótt mistu teir flakan á øðrum sinni. Roynt varð aftur eftir honum. Men undir hesum bjargingararbeiði, legðist so nógvur sjógvur inn yvir tær opnu lúkurnar, at vandi var fyri at hann holvdist. Har var einki annað at gera enn at seta bjargingarbátin út.

Manningin kom í øllum góðum í bátin, ið var fult útgjørdur sum bjargingarbátur. Tá var klokkan blivin um 10.

Tá báturin fer frá skipinum koppar tað. Skorsteinurin ber við stokkin á bátinum, sum hvølvist. Menninir fáa vent bátinum við aftur, og hann flýtur á lufttangunum. Tað eydnast øllum monnunum at taka seg aftur í bátin. Men frá hesi løtu flýtur báturin borðfullur. Teir hava einki at oysa við.



*Systirskip hjá Sally, Kronborg*

Teir seta segl og sigla eftir einum trolara, ið liggur nakað úti eystari. Men tá teir eru komnir nakað út, siglir trolarin frá teimum. Teir sigla ella kanska rættari reka nú vestur eftir.

## Menn drukna og stirðna í hel

Fyri middag eru longu tveir manns stirðnaðir í hel í bátinum. Annar er Niels Monberg, sonur verkfrøðingin Monberg, ið hevur havnagerðina í Føroyum í hondum.

Hin var Carl Olsen, ein 15 ára gamal drongur úr Sørvági, ið var komin við Sally sum skipsdrongur. Carl var beiggi Hans í Beiti, sum nógv kendu. Hann var vinur Niels Monberg, sum Hans hevði biðið um gera tann beina, at lata beiggjan sleppa við! Hetta tosaði Hans ofta um seinni.

Á øðrum sinni fer báturin runt. Teir báðir deyðu og skiparin Christian Hansen hvørva.

Tann næsti, sum doyði, var maskinmeistarin Refslund Skov. Kona hansara var komin til Føroya dagin fyri við Tjaldrinum. Hon skuldi verða búgvandi í Føroyum, meðan maðurin hevði arbeiði her.



*Sally sá ikki út av nógvum*

Matrósarnir báðir fingu bátin aftur á rættkjøl og komu sær uppí hann.

## Báturin kemur inn í Hestfjørð

Báturin rekur síðan suður um Sandoynna og norður við henni vestanfyri. Um dimmið kemur hann inn á Hestfjørð. Tá er annar matrósurin Eigil Olsen Gaarslev langt síðan stirnaður. Tann bjargaði helt, at Eigil doyði um 3-tíðina seinnapartin mánadagin.

Á nátt – ikki er gott at avgera tíðina – rak báturin á land norðanfyri Kirkjubø. Hin seinasti av manningini, matrósurin Viggo Andersen, ein sonn kempa, leyp á land og lat bátin fara. Hann leitaði sær heim til húsa. Kemur inn í eitt hoyggjhús og leggur seg har, útlúgvaður sum hann mátti vera, at sova í hoynum. Tíðliga týsmorgunin verður hann funnin av